Stjørnan-VB 34-21 (15-10):

# Stjørnan rann VB um koll

**VB fekk ikki fótin fyri seg í Klaksvík, og liðið var sent avstað aftur við lemjandi tapi**

HONDBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

Tey, sum høvdu væntað tættan og spennandi dyst í Klaksvík leygardagin, fóru skeiv. Stjørnan vann stórsigur á VB, sum ongantíð kláraði at skapa spenning í dystinum.

Nógv hava mett VB sum fremsta kappingarneytan hjá VÍF til gullmerkini, men hetta vikuskiftið sást einki til hetta. Tveir av stuðulsspælarunum hjá VB vóru ikki við, og tað merktist eisini.

Men fyrst og fremst var tað ein væl upplagt Stjørnulið, sum mesta av tíðini helt nógv ferð á álopsspælinum og kláraði at halda tætt í verjupartinum.

Tað vóru løtur, har vágskvinnur komu við í dystin, men tær vóru fáar, og í seinna hálvleiki kláraðu tær als ikki at fylgja við.



*Stjørnan lat ongan iva vera um úrslitið, tá VB var á vitjan leygardagin. Stjørnan vann stórsigur.*

*Mynd: Alexander Djorovic*

## Gongdin

Stjørnan fekk sera góða byrjan í dystinum. Áðrenn VB var komið í gongd, vóru bóltarnir sendir í meskarnar seks ferðir, og tá góðir 20 minuttir vóru spældir, var støðan 13-5 til Stjørnuna.

Eftir hetta kom VB við í dystin, og við Gabriellu Fekete á odda fingu tær fýra tøtt mál, sum pyntaði eitt sindur um støðuna. Tá liðini fóru til hálvleik, vóru fimm mál á muni.

Í seinna hálvleiki var VB væl við fyrstu 10 minuttirnar, men so setti Stjørnan ferð á aftur, og tær løgdu VB langt aftur um.

Tá átta minuttir vóru eftir at spæla, hevði Stjørnan fingið tvífalt so nógv mál sum VB. Støðan var tá 28-14.

Seinasta partin av dystinum gekk nøkunlunda javnt á. Tað var avgerðin langt síðani fallin, og VB brúkti hesa løtuna til at minka um munin við einum máli.

## Størri breidd

Munurin millum Stjørnuna og VB hendan dagin var, at meðan VB nógv á herarnar hjá Gabriellu Fekete, hevði Stjørnan stóra breidd í sínum spæli. Regina Rado hjá VB hevur ikki gjørt eins nógv um seg í hesi kappingini, sum hon gjørdi í tí seinasta.

Hóast VB royndi at mansverja Simonu Dzuigyte frá byrjan, gjørdi tað lítlan mun hjá henni og restini av Stjørnuliðnum.

Anna Kristina Samson, Joan Midjord Joensen og Andrijana Milodanovic skutu eisini nógv mál, og tað gjørdi góðan mun afturat teimum 13 málunum hjá toppskjúttanum.

Stjørnan tykist virka væl sum lið í løtuni. Tapið móti føroyameistarunum í VÍF var tepurt, men enn er tíðliga á árinum, og spurningurin er nú, hvussu liðini menna og betra spælið hjá sær komandi vikurnar. Tað verður ikki fyrr enn eftir nýggjár, at tað veruliga ferð at galda, og VB kann saktans fer at blanda seg fyri tað, um tær leygardagin høvdu ein svartan dag í Klaksvík.

### Dysturin í tølum:

Stjørnan-VB 34-21 (15-10)

### Málskjúttar:

**Stjørnan:** Simona Dzuigyte 13 (3), Anna Kristina Samson 7, Joan Midjord Joensen 5, Andrijana Milodanovic 4, Una Olsen 3, Bára Skaale 2
**VB:** Gabriella Fekete 10 (4), Jenisa Petersen 3, Regina Rado 2, Eydis Kjærbo 2, Sólrun Krosslá 1, Durita Rouch 1, Anja Mørk 1, Guðrun Midjord 1.
**Brotskøst:** Stjørnan 3, VB 6
**Útvísingar:** Stjørnan 3, VB 3
**Dómarar úr Tjaldur:** Kári Hansen og Trygvi Mortensen.

## Støðan 1. deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 5 | 5 - 0 - 0 | 145 | 94 | 51 | 10 |
| 2 | Stjørnan | 5 | 4 - 0 - 1 | 149 | 114 | 35 | 8 |
| 3 | Neistin | 5 | 3 - 0 - 2 | 121 | 103 | 18 | 6 |
| 4 | VB | 5 | 3 - 0 - 2 | 122 | 122 | 0 | 6 |
| 5 | Sóljan | 5 | 1 - 0 - 4 | 111 | 130 | -19 | 2 |
| 6 | Kyndil | 6 | 1 - 0 - 5 | 137 | 171 | -34 | 2 |
| 7 | StÍF | 5 | 1 - 0 - 4 | 93 | 144 | -51 | 2 |

## Støðan 1. Deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 5 | 4 - 1 - 0 | 146 | 110 | 36 | 9 |
| 2 | Neistin | 5 | 4 - 1 - 0 | 136 | 126 | 10 | 9 |
| 3 | StÍF | 5 | 3 - 0 - 2 | 134 | 128 | 6 | 6 |
| 4 | H71 | 5 | 3 - 0 - 2 | 132 | 132 | 0 | 6 |
| 5 | KÍF | 5 | 1 - 1 - 3 | 122 | 139 | -17 | 3 |
| 6 | Kyndil | 6 | 1 - 0 - 5 | 140 | 159 | -19 | 2 |
| 7 | Tjaldur | 5 | 0 - 1 - 4 | 114 | 130 | -16 | 1 |

# – Vit høvdu meira at spæla uppá

**– Nógvir spælarar hjá okkum taka ábyrgd, og tað ger mun móti einum liði, har tað verður spælt nógv upp á ein spælara, sigur venjarin hjá Stjørnuni**

HONDBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

Tað kom ikki óvart á venjaran hjá Stjørnuni, at hansara lið vann á VB, men hann hevði ikki roknað við so stórum sigri.

– Eg vænti altíð, at vit fara at vinna, men eg skal viðganga, at hesin sigurin gjørdist størri, enn eg hevði væntað frammanundan, sigur Geir Wardum.

– Vit hildu høgt tempo meginpartin av dystinum, og tað kláraði VB als ikki at standa ímóti. Tær løturnar, tá vit fór niður í ferð, komu tær við í dystin, men so ráddi um at fáa spælararnar í gongd aftur.

Tveir av føstu spælarunum hjá VB – Gurið Mortensen og Margreth Augustinussen – vóru ikki við, og tað var eingin fyrimunur fyri VB.

– Eg trúgvi tó neyvan, at tær høvdu kunnað gjørt tann stóra munin hendan dystin, heldur Stjørnuvenjarin.

## Størri breidd

Hóast Stjørnan hevur mist onkrar profilar frá seinsta kappingarári, so hava úrslitini higartil verið sera góð. Eitt tepur tap móti VÍF er einasta strikan í rokningini.

– Nógvir spælarar hjá okkum taka ábyrgd, og tær ger, at vit hava nógv at spæla uppá. Men tað kann gerast enn betri, tí helvtin at spælararunum kom ikki til venjingar fyrr enn fyri trimum vikum síðani, sigur Geir Wardum.

– VB spældi nógv upp á ein spælara, og tað tóktist, sum hinar ikki rættiliga tordu at bjóða av og skjóta. Tí høvdu vit ongar trupulleikar av VB hesaferð.

Stjørnan liggur nú einsamøll á 2. plássi aftan fyri VÍF.



Neistin-VÍF 15-26 (10-10):

# VÍF avgjørdu seinna umfarið



**Eftir at Neistin hevði fylgt væl við í hálvan tíma, settu vestmannagenturnar alt upp á pláss í seinna hálvleiki**

HONDBÓLTUR, KVINNUR
*Jákup Mørk*

Einki var at taka seg aftur í, at VÍF var stórfavorittur at vinna kvinnudystin á Hálsi sunnudagin, men tá liðini fóru til hálvleiks, sást tó lítið til hetta favoritt-heitið. Máltalvan sýndi nevnliga, at liðini høvdu 10 mál hvør, og mett eftir dystargongdini fram til tá, so stóð Neistin seg eins væl og gestirnir.

## Bonkurin var á muni

Eftir at VÍF – og serstakliga Ioana Rápa – høvdu havt mundin fyrstu 20 minuttirnar av fyrra hálvleiki, so eydnaðist tað seinasta triðingin av hálvleikinum at læsa í verjupartinum, og við trimum málum hesa løtuna fingu tær samstundis bart seg upp á liðina av VÍF.

Hóast tað soleiðis var javnt í málum, so vóru tó onnur tekin um, at tað allar helst fór at enda við einum vestmannasigri hendan dagin. Neistaliðið stríddist sum sagt framúr væl, men hetta var eisini nakað, sum kostaði kreftir, og tá VÍF ikki sá út til at overva seg, samstundis sum bonkurin í løtuni er tann sterkasti í landinum, so var ikki annað enn væntandi, at VÍF kundi seta trumf á í seinna.

Hetta skal ikki skiljast sum ein niðurgerð av Neistanum ella nøkrum øðrum liði í landinum, men tá VÍF hevur ráð at byrja ein dyst við leikarum sum Nicoletu Radu, Manuelu Stan og Jacklin Durhuus á beinkinum, so sigur tað ein heilan hóp um, hví liðið hevur verið at kalla einaráðani hetta seinast árið ella so, og so er ikki ein gong talt við, at Christina Holm eisini verður millum tær gulu, tá hon er komin fyri seg aftur.

## Einfalt og vakurt

Tað vísti seg eisini í seinna hálvleiki, at VÍF hevði nakað væl av kreftum eftir á goymslu, og eftir at tær høvdu nýtt fyrstu løtuna eftir steðgin til at skræða seg leysar, kundu tær veruliga seta gongd á tað so væl kenda kontraspælið.

Fyri áskoðararnar var tað ein fragd at hyggja at, hvussu disciplineraðar genturnar vóru á vøllinum, men fyri Neistan mundi hetta kennast sum ein sonn marra. Í stuttum kann sigast, at nærum tað einasta, sum VÍF gjørdi seinastu 20 minuttirnar, var, at tær løgdu stóra orku í verjuspælið, og tá so Neistin antin mistu bóltin, ella vórðu noyddar at skjóta útifrá, fall hamarinh. Langt kast niðan á vøllin og mál. Sera einfalt og sera vakurt hondbóltsspæl.

## Nógv tær bestu

Sum seinna hálvleikur leið, mundi standa øllum greitt, at VÍF hevur ikki bara tað sterkasta liðið í landinum. Styrkin er somikið stór, at tað er stórt sannlíki fyri, at tær endurtaka bragdið frá í fjør, har tær vunnu kappingina við fullum stigatalið umframt steypakappingina. Hetta er í stóran upp til VÍF-kvinnurnar at gera av, tí sjálvsagt kunnu tær snáva á vegnum, men hava tær rætta hugburðin til hvønn dyst, so er tó ilt at síggja, hvussu hetta skal bera til.

Ein annar spurningur er so, hvussu stuttligt hetta er fyri føroyskan hondbólt. Longu í fjør var sum sagt stórur munur á, og tá liðið nú eisini er styrkt við tveimum føroyskum landsliðsleikarum, ber illa til at ímynda sær eina spennandi kapping. Hinvegin er hetta helst neyðugt, um eitt føroyskt lið (í hesum føri VÍF) skal standa seg væl í Europa-Cup, tá hetta verður á skránni í januar mánaði, og teir báðir dystirnir eru uttan iva størsta – men kanska eisini hin einasta – avbjóðingin, sum VÍF fær í ár.

### Dysturin í tølum

**Neistin-VÍF 15-62 (10-10)**
Málskjúttar:
Neistin: Katrin á Neystabø 6(4), Birita Wardum 5, Susan Brockie 2, Inga F. Danberg 1, Annika Thomsen 1
VÍF: Ioana Rápa 11(3), Nicoleta Radu 5, Sóleyð Mikkelsen 3, Jacklin Durhuus 2, Jórun Ludvic 2, Fríða Marjunardóttir 1, Alis Høghamar 1, Randi Kúrberg 1
Brotskøst: Neistin 5, VÍF 5
Útvísingar: Neistin 4, VÍF 3
Dómarar úr Kyndli: Uni Wardum & Hannis Wardum. Gjørdu ikki uppgávuna torførari enn hon var.

## VB vann innandurakapping

Um vikuskiftið hevði VB árligu innandurakapping sína, og tað vóru vertirnir sjálvir, sum fóru við trimum teimum fremstu plássunum í kappingini.

Liðið, sum vann kappingina, var mannað við Finnboga Olsen, Jóan Pauli Olsen, Eyðun Jacobsen, Gisli Sveinbjørnsson og Símun Samuelsen.

Teir fingu 10.000 krónur í vinningi.

Ársins spælarar vóru eisini kosnir. Tað vóru spælarar úr teimum ymsu feløgunum, sum atkvøddu um hetta. Úrslitið var, at Jákup á Borg gjørdist Ársins spælari. John Petersen var nummar tvey og Fróði Benjaminsen nummar trý.

Ársins málverji varð eisini kosin, og her var Bjarni Johansen nummar eitt, Tróndur Vatnhamar nummar tvey og Jens Martin Knudsen nummar trý.

*ek*